TÍÐINDI

Hugtikin av føroyska landslagnum:

- FØROYAR GEVA MÆR ÍBLÁSTUR

- Mítt málaralív hevur verið fult av íblástri frá teimum 18 oyggjunum, sigur danska listakvinnan, Anna Grethe Aaen, sum ger nógv burturúr føroyska landslagnum í sínari list

Pætur Hjalmar Evensson
patur@sosialurin.fo

Havið, fjøllini, veðurlagið, náttúran og bygdirnar í Føroyum hava altið hugtikið føroysk listafólk. Føroyska landslagið er uttan iva mest vanliga motivið hjá føroyskum listafólki og er tað enn í dag. Men tað eru ikki bara føroyingar, ið síggja nakað listarliga áhugavert við føroysku náttúruni. Danska listakvinnan Anna Grethe Aaen hevur í fleiri ár málað málningar av føroyska landslagnum, og hon hevur eftir hondini gjørt eina stóra rúgvu til samans.

"Færø-landskaber" kallar hon málningarnar hjá sær, sum eru av føroyska landslagnum. Við bleytum, dempaðum og flottum litum hevur hon á meistarligan hátt málað fjøll, havið, mjørka og seyð í nógvum ymsum sambondum. Hennara stílur víkir frá síðbundnu føroysku landslagsdonsku náttúruni, sum hon altið hevur fingist nógv við, og sum er hennara serkenni í Danmark.

Hesa gentuna kallar hon "Rannvá" við íblástri frá søguni um Rannvá í Skúvoy

Drotning Margrethe hevur eisini verið til framsýning hjá Anna Grethe Aaen

málningunum, og tað er lætt at kenna hennara penslastrok aftur. Tað er ein serlig javnvág í hennara málningum, sum spælir við sansir og abstraktión uttan óneyðugar smálutir.

Anna Grethe Aaen er aktiv og ferðast frá staði til stað við nýggjum framsýningum. Nógv viðurkend donsk gallarí hava havt málningarnar hjá henni av føroyska landslagnum hangandi á veggunum, umframt tey nógvu motivini av notu annars uppihaldið í Føroyum. Ein nostalgisk Anna Grete Aaen fortelur víðari um hennara fyrsta møtið við Føroyar, sum var grundarlagið fyri íblástrinum av føroysku náttúruni í málningum hennara.

- Aftaná at hava vitjað listasøvnini fóru vit í ein buss, og næsta stopp var Mykines. Vit endaðu í einum báti, sum rullaði og spældi sær í breiðu atlantshavsaldunum. Í Mykinesi búðu vit í einum lítlum bláum húsum og lóu í koyggjum. Tað var bergtakandi at vitja lundalandið har. Men veðrið bleiv verri og verri, og so kom orkanin. Vit fingu boð um at halda okkum innandura og krokaðu tí í kirkjuni. Eg minnist, at eg hugdi út gjøgnum vindeygað, og eg hevði tekniblokkin við mær, greiðir hon frá.

Seinastu fýra daganar av føroyaferðini vóru tey við Gjógv, og aftur her varð hon ávirkað – hesa ferð av sjarmerandi bygdarlívinum og umhvørvinum við Gjógv.

- Nú var stundin komin til at brúka krit og blýant, sigur hon.

Kom til Føroya

Men hvussu ber tað til, at Anna Grethe Aaen júst hevur fingið so stóran tokka til føroyska landslagið, at tað er blivið motiv fyri so stórum parti av hennara yrkisleið og portfolio? Hon greiðir frá, at alt byrjaði í ár 2000, tá hon saman við einum ferðaliði frá listaskúlanum í Randers fór ein túr til Føroya. Tey vitjaðu øll tey støðini, sum eru verd at síggja hjá listaáhugaðum og hon hevur ikki verið her síðan námsferðina við listaskúlanum. Anna droymir seg aftur til dagarnar, har hon veruliga lærdi føroyska veðurlagið og náttúruna at kenna á nýggjum.

- Vit koyrdu kring allar oyggjarnar. Vit sóu tær vakrastu viðmyndirnar, sóu fantastiskt skýggj við glottum og upplivdu pollamjørkan. Vit upplivdu so hvassan vind, at fossarnir stóðu vatnrættir út frá fjallaliðini, og vit lærdu at taka brillurnar av í storminum, sigur Anna Grethe Aaen so listarliga, sum málaði hon ein málning av minnum sínum.

- Lærdi at taka brillurnar av í storminum

10 ár seinni kemur Anna Grethe Aaen til Føroya aftur saman við manni sínum, og

Hugtikin av føroyska landslagnum

Føroysku náttúrumotivini festi seg í donsku listakvinnuna, og hon setti sær nú veruliga fyri at mála tað føroyska landslagið, júst soleiðis sum hon upplivdi tað. Hon vil hava ein feril av dramatikki í sínar málningar, hóast teir enn eru eyðkendir fyri ikki at avdúka ov nógv.

- Eg leggi meg serliga eftir, at tað skal vera vatn ella hav í málningunum. Helst panorama. Eg máli næstan ongantíð bláan himmal, men gjarna skýggj, óveður og mjørka, greiðir Anna Grethe Aaen frá.

- Mítt málaralív hevur verið fult av íblástri frá teimum 18 oyggjunum. Gamani eri eg landslagsmálari, men Føroyar geva mær eitt forfrískandi skump til hetta, sigur hon.

Ov nógvur vindur til akvarell

Tá Anna Grethe Aaen er í Føroyum, dámar henni væl at vera úti í náttúruni við pensilinum og mála. Men tað er ikki bara sum at siga tað, og føroyska veðurlagið, sum henni dámar at mála, spælir henni eitt puss viðhvørt.



Viðoy - ein av nógvu málningunum hjá donsku listakvinnuni so

- Í Føroyum máli eg einki annað enn neopastellir ella oljukritsmyndir. Eg havi roynt meg við akvarell, men tað er púrasta ógjørligt at halda skil á pappírinum í øllum vindinum og samstundis finna læ.

- Mann kann saktans finna læ, men tað er ikki akkurát har, eg upplivi tað útsýnið ella motivið, sum eg eri áhugað í at tekna, sigur hon og vísir á aðrar skemtiligar avbjóðingar og sjarmur, sum mann ivaleyst bara kann uppliva í Føroyum.

- Eg eri blivin álopin av tjaldrinum, sum helt, at eg bara skuldi sleppa mær burtur aftur. Eg havi sitið í haganum millum seyðirnar, sum í byrjanini flýggjaðu undan mær, men sum seinni spakuliga nærkaðust mær aftur við einum ávísum forvitni. Eg havi eisini brúkt seyðirnar í mínum landslagsmálningum, men har blivu teir av onkrari orsøk bláir, fortelur hon skemtandi.

Trø og skógir

Tá hon ikki málar føroyska landslagið, fæst hon eitt nú serliga nógv við at mála ta donsku náttúruna. Henni dámar væl at mála trø og skógir, og í hennara býi Mariager er ovmikið av inspirerandi motivum.

- Tað gevur meining fyri meg, um eg við litum kann geva málninginum eitt huglag. Tann syraði guli liturin gevur mystikk, men mystikkur kann eisini fjala seg í toku ella í mjørkatámi. Og í blåa tímanum kann alt henda. Trøini broytast fyri hvørja árstíð, men ljósið er altið tað týdningarmesta, tá eg máli, sigur hon.

Hesin málningurin hevur heitið "Huse i det grønne"

Hevur forelskað seg í Føroyum

Anna Grethe Aaen hevði sína fyrstu framsýning í Føroyum í apríl 2015. Hetta var í Smiðjuni í Litluvík. Tá reisti hon spurningin, um mann kundi forelskað seg í nøkrum smáum oyggjum í Atlantshavinum. Hennara niðurstøða til tað er, at hennara forelskilsið í Føroyum minnir um sannan kærleika.

- Eg elski útsýnið til oyggjarnar, sum eru langt burturi. Eg elski dramatikkin millum tað harðrenda fjallið og teir bleytastu grasheyggjarnar. Eg elski tær stóru viddirnar uttan ábending um hús ella lív. Eg elski tann grøna litin og tað turkisa vatnið.

Føroyska náttúran fangaði Annu Grethe Aaen